## DAGSINS MEINING

# Ekstremar og vald

Føroyingar hava altíð borið orð fyri at vera eitt siðiligt, fólkaligt, róligt og trúgvandi fólk. Vit hava borið orð fyri at vera gestablíð móti fremmandafólki, og vit hava dugað at víst tolsemi mótvegis hvørjum øðrum og øðrum. Síðani víðgongdar og ekstremar rørslur av ymsum slag, tað verið seg átrúnaðarligar ella politiskar, hava tikið seg upp her á landi, er gingið niður á bakka í so máta. Intoleransa og trongskygni hava fingið fastatøkur í pørtum av samfelagnum. Hetta merkir samfelagskjakið, og hetta merkir eisini í ávísum førum politikkin her á landi. Tá sagt verður, at vit hava brúk fyri persónum, rørslum ol., ið kunnu flyta mørk, so er tað langt frá altíð rætt. Sjálvandi hevur eitt samfelag tørv á fólkum og rørslum, ið kunnu vera við til at menna og skunda undir eina sunna tilgongd, men tað má tó ikki byggja á, at samfelagsmenningin kann verða stýrd av víðgongdum - fundamentalistiskum/ fanatiskum kreftum.

Demokratiið, sum er grundarsteinurin vit byggja á, loyvir okkum øllum, so ymisk vit enn eru, at búleikast og mennast á hesum klettum. Men tað er eisini eitt demokrati við ábyrgd fyri sær og sínum næstu. Nettupp tí vit hava eitt demokrati sleppur tú ikki undan hesum víðgongdu kreftunum. Tær finnast í øllum demokrastiskum samfeløgum, men flest alla staðni eru tær í minniluta og hava ikki stóra ávirkan. Alt Frakland var um at fella í fátt, tá høgraekstremi politikarin Le Pen, bráddliga fekk vind í seglini.

Í Føroyum eiga vit eisini at vera á varðhaldi fyri hesum kreftum. At víðgongdar átrúnaðarligar kreftir eisini hava fingið eitt bein inn um tinggáttina er nakað, sum okkara demokrati loyvir. Soleiðis skal tað eisini vera. Tó kann spurnartekin setast við sperrimarkið. Men rópast má varskó, tá slíkir ekstremir religiøsir minnilutar gjøgnum politisku skipanina vilja taka sær meira vald enn undirtøka er fyri í fólkinum. Men slíkt vald fáa teir bert, um aðrir flokkar geva teimum tað. Og í Føroyum ár 2003 er støðan tann, at Tjóðveldisflokkurin - fyri at kunna varðveita mest møguligt vald sjálvur og fyri at halda øðrum stórum meirilutaflokkum uttan fyri alt vald - hevur givið tí ekstrema Miðflokkinum óhugnaliga stórt vald. Tað er í veruleikanum hesin flokkurin, sum setir debatdagskránna í Føroyum í dag. Hann hevur fingið eina lyklastøðu við at vera 17. liðið í samgonguni. Tað liðið, sum annars tann hóvligi Sjálvstýrisflokkurin hevur átt og sum hann í mongum førum hevur dugað at livað upp til. Tað er ófatiligt, at stuðlar Tjóðveldisfloksins ikki tala at leiðslu floksins fyri at hava givið hesum eina ekstrema minnilutaflokkinum so stórt vald í tí føroyska samfelagnum. Vit eiga tó ikki at útihýsa slíkum flokkum, og tí mugu vit eisini venda okkum harðliga ímóti dreingjalótum sum at senda hóttandi sms ella spreingja postkassar. Hinvegin eigur móttakarin eisini at kenna sína ábyrgd fyri demokratiinum, og tað er at vísa tolsemi í orð og tal og ikki bara gera øll onnur til gudloysingar og syndarar, tá hesi velja at tulka sannleikan og moralin øðrvísi.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Sambandsflokkurin lýgur fyri tær

**Aki Andreasen**

Tað er í lagi at vera politiskt ósamdur og at vísa á sínar politisku ætlanir.

Men tað er beinleiðis ússaligt at byggja ein flokk og ein politikk á at lúgva upp á tíni mótstøðufólk.

Í eini ótespiligari roynd at søkja sær egnan politiskan vinning burturúr lagnuni hjá óskyldugum fólki, hevur Sambandsflokkurin sent út eitt tíðindaskriv. Tað varð lisið upp í Útvarpi Føroya, sunnudagin 10. november 2002, og partar av tí endurtiknir í tíðindasending í ÚF mánamorgunin 11. november 2002.

Tíðindaskrivið setur beinleiðis lygnir á prent, sum bert kunnu hava til endamáls at skapa ótta millum fólk.

Sambandsflokkurin skrivar, "at í 2001 vóru játtaðar 80 mió. krónur til sjúkraviðgerð uttanlands, meðan einans 60 mió. eru játtaðar á verandi fíggjarlóg."

Hetta er beinleiðis lygn. Á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2001 vórðu játtaðar 53 mió. krónur. Síðani varð brúkt meira enn játtað og eykajáttan givin. Á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2002 vórðu játtaðar 60 mió. kr. - og nú verður við eykajáttan biðið um 20 mió. afturat.

**Her er sannleikin - hvørki meir ella minni!**

Síðani 1997, tá sambandsflokkurin sat í landsstýrinum - og tá allur blokkstuðulin varð brúktur - eru játtanirnar til serviðgerð uttanlands hækkaðar úr 33 mió. krónum upp í 80 mió. kr.

Sostatt er tað eisini beinleiðis lygn, tá sambandsflokkurin skrivar, "at tey sjúku og veiku verða noydd at bera byrðarnar av politikki samgongunnar".

Síðani vit byrjaðu at seta blokkstuðulin til viks, og eftir at vit hava minkað hann beinleiðis, eru játtanirnar til eldrarøkt, serforsorg, almannamál, sjúkrahús og heilsumál, undirvísing og gransking øktar.

Tá sambandsflokkurin brúkti allan blokkstuðulin í 1997 vórðu játtanirnar til almanna- og heilsumál ikki raðfestar høgt. Á uppskotinum til fíggjarlóg fyri 2003 - har blokkstuðulin er minkaður - hevur ongantíð verið játtað so nógv til tey sjúku og veiku:

| | 1997 | 2003 |
|---|---|---|
| Almannamál: | 888 mió. | 1.254 mió. |
| Heilsumál: | 370 mió. | 546 mió. |

Sostatt eru almannamálini hækkað við 366 mió. og heilsumálini við 176 mió. hesi árini, tá blokkstuðulin er settur til viks og minkaður.

**Nógv er enn at fremja**

Nógv er eftir at gera, áðrenn vit hava ruddað upp eftir ábyrgdarloysið í ríkisfelagsskapinum, tá landið fór á heysin við fullum blokkstuðli og milliardalánum afturat. Men raðfestingarnar hava ongantíð verið greiðari.

Undirritaði heitir á allar fjølmiðlar um at kanna sonevnt tíðindatilfar, ið kemur frá politiskum flokkum fyri beinleiðis ósannar upplýsingar- áðrenn nakað verður borið víðari.

Harundir eru upplýsingarnir í hesum skrivi sjálvandi íroknaðir. Einum og hvørjum stendur frítt at kanna, hvat er rætt og hvat er skeivt.

Verður tað ikki gjørt, eru fjølmiðlarnir við til at byggja almenna orðaskiftið á lygnir og útspilling.

# Skjótt er at gloyma egin mistøk

**Annita á Fríðriksmørk**



Tað er ikki smávegis sum Hans Pauli Strøm fer eftir landsstýrismanninum í umhvørvismálum í grein í farnu viku. So útspillandi og hatursfull, at slíkt orðalag neyvan hevði fingið innivist í nøkrum blaðið úti í heimi.

Men hvat hevur Eyðun Eltør so gjørt? Jú, hann hevur fingið ræðandi tøl um umhvørvi á borðið.

At tølini mugu fáa onkran at rakna við eri eg samd í. Men hví júst HPS lýpur soleiðis á EE er illa skiljandi. Úrslitið av tølinum er ikki nakað, sum er skapt meðan EE hevur umsitið økið. Tað er hinvegin eitt úrslit, sum so líðandi er skapt tey seinastu 30 árini, tá eisini Javnaðarflokkurin hevur sitið við landsins leiðslu, og millum annað umsitið orkumál. At so EE endiliga hevur fingið tøl á borðið, átti ikki at øst ein hagfrøðing á slíkan hátt, sum tað eftir øllum at døma ger. Nýggj hagfrøði gevur hinvegin høvi til at arbeiða víðari við málinum á einum gagnligum og gevandi grundarlagi.

**Hvussu roynist hann so í verki?**

Harafturat er at siga, at fleiri løgtingslógaruppskot vóru av andstøðutinglimum løgd fram á ting í seinasta valskeiðið. Løgtingslógaruppskot, sum høvdu til endamáls at lækka avgjaldið á brenniolju. Uppskotini vóru feld, takkað verið samgonguni. Ongin í Javnaðarflokkinum atkvøddi ímóti hesum uppskotum, - heldur ikki HPS!

Hinvegin varð uppskotið hjá Javnaðarflokkinum um at lække avgjaldið á bensini samtykt, hóast Tjóðveldisflokkurin atkvøddi ímóti. Við at vísa umhvørvisfyrilit og við at vísa á búskapin, sum var í hæddini so mælti Tjóðveldisflokkurin til at fella uppskotið hjá Javnaðarflokkinum.

Við øðrum orðum var Javnaðarflokkurin hvørja ferð hesi uppskot vóru fyri á tingi gjørdur varðugur við vandan við umhvørvisdálking. Men hetta rein ikki við Javnaðarflokkin, har var ongantíð ein atkvøða fyri umhvørvinum, - heldur ikki frá Hans Pauli Strøm!

So skjótt er at gloyma egin mistøk.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Skal pappírið vera blankt, so lat tað vera blankt á báðum síðum

**Jóannes Eidesgaard**



Løgmaður bjóðaði í gjár pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, formonnunum fyri flokkarnar á tingi, landsstýrismonnum og aðalstjórum til fundar fyri at seta skjøtil á arbeiðið at samskipa og seta í verk skipanir og loysnir, ið viðkoma pørtunum á arbeiðsmarknaðinum.

Løgmaður undirstrikaði, at byrjast skuldi á einum blonkum pappíri, og at neyðugt var at fáa partarnar á arbeiðsmarknaðinum við og ikki minst, at allir flokkar á tingi skuldu kunna taka undir við tí, sum fór at spyrjast burturúr.

Løgmaður undirstrikaði í hesum sambandi, at tað var hann, sum nú átók sær hetta arbeiðið, hóast aðrir landsstýrismenn varða av ymsu málunum, ið talan er um. Málini eru:

- o Skattapolitikkur
- o Eftirlønarskipan
- o Pensjónsskipan
- o Barnsburðarfarloyvi
- o Als
- o Lív
- o Atgongd til arbeiðs marknaðarútbúgvingar
- o Karensdagar
- o Arbeiðsmarknaðartrætur

Løgmaður hevur sostatt átikið sær ein leiklut, sum man kennast honum rættiliga fremmandur, nevniliga at samskipa viðurskifti, sum hoyra til aðrar landsstýrismenn. Hin vegin er tað gleðiligt, at løgmaður nú ásannar, at eingin av hansara tegnum er mentur at lyfta og tíansheldur at loysa m.a. trupla pensjónsmálið fyri allan arbeiðsmarknaðin. Gott og væl eitt valskeið er farið og einki úrslit.

Hugskotið hjá løgmanni er gott, og vit í Javnaðarflokkinum kunnu ikki annað enn fegnast um hetta stig.

Á innleiðandi fundinum vóru trý innlegg:

- o skattur og ávirkanina á samfelagið
- o framtíðar aldursbýtið og pensjónir
- o ymiskar eftirlønarskipanir.

Trý áhugaverd innlegg. Men als ikki nøktandi, tí týðandi partar av arbeiðsmarknaðarpolitikkinum vóru als ikki tiknir við. Hví bert taka trý innlegg, um innlegg skuldu vera til slíkan fund? Høvdu hesi trý størri týdning enn tey, sum ikki vóru?

Tað tykir mær løgið, nú løgmaður leggur so stóran dent á at byrjast skal við blonkum pappíri, at so nógv tos kann vera um framtíðar pensjónsskipanir, uttan at samhaldsfasti verður tikin uppá tungu. Tað er í lagi, at løgmaður ynskir eina fólkatrygging, har hvør sætar sær, og tað er eisini í lagi, at ein tryggingarmaður greiðir frá um tær loysnir, sum liggja í tryggingarskipanini, men heilt at tiga samhaldsfasta burtur, nú byrjast skuldi, tað var ikki serliga kvalifiserað.

Samhaldsfasti er ein veruleiki, og tað veit løgmaður væl, og hann veit eisini, at stórur partur av løntakarasíðuni á arbeiðsmarknaðinum og í hvørfall Javnaðarflokkurin síggja henda sum einasta skilagóða møguleika fyri einari skjótari og góðari loysn á pensjónsmálinum. Tí skuldi sjálvandi eitt innlegg snúð seg um henda møguleika, um møguleikar nú skuldu nevnast á fundinum. Hví var samhaldsfasti frá fyrsta fundi útistongdur?

Eisini mælti løgmaður til eina verkætlanarnevnd, har arbeiðsgevararnir fáa trý umboð og løntakarafeløgini fáa trý. Hetta ljóðar jú rímiligt. Men síðan skulu fleiri aðalráð umframt løgmansskrivstovuna umboðast. Hetta kan ikki annað enn geva eina slagsíðu, har løntakararnir verða undirumboðaðir. Eg taki tað fyri givið, at umboðini fyri ráðini heldur halla til arbeiðsgevarasíðuna enn løntakarasíðuna, serliga soleiðis sum politiska vektin liggur í sitandi samgongu. Neyvan fer eitt nú fíggjarmálaráðið at tala søk løntakaranna.

Men alt í alt eitt gott tiltak og eitt gott hugskot frá løgmanni, um tað tók honum hálvfimta ár at koma so langt. Men eg haldi tíverri ikki, at byrjanin boðar frá einum heilt blonkum pappíri. Pappírið er bert blankt, um báðar síðurnar eru blankar. Men tað fara løntakaraumboðini uttan iva at gera vart við.

Annars góðan arbeiðshug.

# Raðfestingin

**Lisbeth L. Petersen, Sambandsflokkurin**



Mikudagin verður á fólkatingi 1. viðgerð av L. 49 : Forslag til lov om tilskud til Færøernes hjemmestyre for 2003-06.

Málið snýr seg um staðfesting av avtalu millum donsku stjórnina og Føroya landsstýri um heildarveitingina, so leingi hetta landsstýri í mesta lagi situr.

Málið skal samb. reglunum lógarfestast bæði á fólkatingi og á Føroya løgtingi. Og so eru tjóðveldisfólkafloks-, sjálvsstýris- og miðflokspolitikarar helst nøgdir, so hava teir tryggjað sær nakað av donskum peningi at føra sín fullveldispolitikk við!

Men áttu tjóðveldispolitikarar ikki at kent seg eitt sindur illa, hóast alt ? Heildarveitingin skuldi jú burtur við størri ferð enn so!

Landsstýrið hevur fingið avtaluna við skerdari heildarveiting eftir sínum vilja, danir eru lagaligir, og so skuldu øll verið glað ! Ella hvussu?

**Ágangurin á samgonguna**

Eg kann vissa løgtingslimin Kristinu Háfoss, ið ikki skilir ágangin á samgonguna í hesum døgum, eins og Karstin Hansen, landsstýrismaður, at nógvir føroyingar eru alt annað enn glaðir, nú fyrst og fremst føroyskir sjúklingar gjalda prísin.

Vit í Sambandsflokkinum hava onki ímóti, at Føroyar fáa ein sjálvberandi búskap, men reseptin skal ikki vera tann, sum nú verður brúkt. Okkara boð er ein tilgongd, sum landið orkar at bera, har aðrir møguleikar fyrst finnast fyri at halda búskapinum uppi fyri ikki at skapa ruðuleika, og har vælferðin ikki verður spæld okkum av hondum.

Tað verður hon nú, tað hava vit sæð seinastu dagarnar, har fylgjurnar av fullveldisraðfestingini av álvara eru farnar at merkjast, og sláast skal fast, at ynskið er komið úr Føroyum, ikki úr Danmark!

**Reseptin hjá landsstýrinum**

Hjá landsstýrinum er reseptin: Fyrst skal avgerðin takast og setast í verk, so skal kannast, um tað nú ber til.

At úrslitið fór at verða sum seinastu dagarnir hava prógvað, ávaraðu vit um, men vit vóru skírd ábyrgdarleys og svartskygd.

Slíkar ákærur eru vit tó so von við, so tær nerva okkum ikki, tí vit halda fast við okkara høvuðssjónarmið, og teim sleppa vit ikki.

Tað sum er hent er óforsvarligt, tað hava vit fingið prógv fyri seinastu dagarnar. Føroyingar, sum hava hjálp fyri neyðuni og sum hildu seg hava nøkur rættindi, kenna seg nú sum eina fíggjarliga byrðu. Tað er óvirðiligt ! Og her hugsi eg ikki bert um tey dømi, vit hava sæð í fjølmiðlunum, tí tað finnast onnur dømi, sum ikki eru komin fram í fjølmiðlunum, men sum eru minst líka skelkandi.

**Vælferðin**

Kristina Háfoss skrivar í bløðunum, at samgongan hevur øll árini raðfest vælferð føroyinga hægst og eru øktu útreiðslurnar nýttar til at bøta um vælferðina.

At nakrar ábøtur eru gjørdar, nú so ríkiligt hevur verið til av peningi (við hægsta ríkisstuðuli nakrantíð!) er onki at reypa av, tí tað vildu allir flokkar gjørt fyri at rætta uppaftur tað, sum varð niðurpínt undir kreppuni, og tað hevur ikki skortað við stuðuli frá andstøðuni, tá slík uppskot eru komin frá samgonguni.

Men samstundis hevur samgongan felt andstøðuuppskot, ið bendu á sama bógv!

So kunnu Karsten Hansen og Kristina Háfoss tosa so nógv tey vilja um at vælferðin er raðfest fremst.

**Pengar og játtan**

Vit hava ikki pengar til at hjálpa teim, sum hava hjálp fyri neyðuni, tí vit hava raðfest fullveldið hægst, og teir pengar, sum Kr. Háfoss skrivar um skuldu tryggja vælferðina, gera ikki munin, tí alt hendir við so lítlari ferð, og har er út- og umbyggingin av landssjúkrahúsinum eitt talandi dømi. Har verður ikki liðugt at byggja út fyrr enn um eini 12 ár. Og so skal ikki gloymast, at avgerðin at byrja varð tikin av eini heilt aðrari samgongu enn hesari og undanfarnu samgongu. Tá var lítið til av peningi at gera gott við, men tað er tað nú samb. landsstýrismanninum við fíggjarmálum, men ferðin er ikki sett upp fyri tað og hon sær heldur ikki til at blíva tað.

Tá bygningurin ætlandi verður liðugur næsta summar, verður hann ikki tikin í nýtslu, tí tá verður ikki peningur tøkur til tól, so tað má bíða til árið eftir. Neyðugt hevur verið við eykajáttanum til nýggja bygningin (12 mill. kr. fyri fáum døgum síðan) og tað verður tað eisini komandi ár, hava vit fingið at vita. Til raksturin í ár er eykatørvurin einar 20 mill.kr. Tá eru lógarbundnu avgerðirnar til Norðuroyartunnilin og Vág ikki tiknar við, ið eru umleið 40 mill. kr.

Og so tosa samgongulimir samstundis um at finna 200 mill. kr. at spara á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2003 !

Tá avtalan um heildarveitingina, sum er eftir leisti samgongunnar, skal samtykkjast á Føroya løgtingi um stutta tíð, átti onkur í samgonguni at kent seg illa, tí hetta er ábyrgdarloysi burturav, og tey veikastu gjalda prísin, tað síggja vit nú.

Og tá er vælferðin ikki raðfest hægst, tvørturímóti!

# Viðmerking til Hans Paula Strøm fyrrverandi løgtingsmann

**Eli Elttør**

Fyrst vil eg takka tær fyri at tú vísir umhvørvinum slíkan ans. Tað trúgvi eg at pápabeiggi er sera fegin um. Men at tú dittar tær at kalla Eyðun Elttør, sum helst man teljast millum siðiligastu persónar Føroyar hava fostrað: klovn, innantóman, tápuligan, ábyrgdarleysan og ikki minst lygnara, er mær, og helst nógvum øðrum føroyingum við, ov mikið. Eg skal ikki koma inn á, hvussu tú sært út. Tað veldst sjálvsagt um eygað, sum sær.

Góði Hans Pauli, eg vóni, at Eyðun fer at taka teg í fullum álvara og taka neyðug stig til frama fyri umhvørvið.

Eg skjóti upp, at hann útnevnir tey øki, sum standa tær nærmast, til pilotprojekt. Hetta tekur tú sjálvsagt eisini fult undir við.

**Uppskot:**

1. Smyril siglir bert 2 túrar til Suðuroynna um vikuna
2. Tað er ikki loyvt at koyra til og frá Vestmanna við privatbili í vikuskiftinum
3. Tað er ikki loyvt at koyra við privatbili úr Vestmanna eftir kl. 18.00 allar dagar í vikuni
4. Vinnulívið í Vestmanna verður lagt stilt í vikuskiftinum. Tó er SEV undantikið.

Vælgagnist.

Eg haldi ikki, at Føroyar eru eitt **Lortaland**, men at her búgva **ørvitisknokkar**, tað kann eg taka undir við.